

**Agga Niclasen**
*meining@meyl.fo*

Kjak

# Lat nú tey órættvorðnu fáa frið!

*Uni Arge letst hava eina upppumpaða mynd av Jenisa yvirtalingarevni, og lítið álit á hansara egna førleika at sannføra*

Lat meg bara byrja við Wayne Rooney. Ja, hann!, Manchester United-leikarin. Óuppdrigni lortendin, sum hann er, ófittur sum beri fanin, og sum er hví, mær dámar hann.

Rooney hevði akkurát skorað eitt hattrikk ímóti West Ham, og ístaðin fyri at boksa hornaflaggið ella mussa kameralinsuna, fanga hann og kameramaðurin hjá Sky hvønnannan, og ýlur "You fucking beauty". Alt England á gosi.

Tað er óvist, um tað er tí, at hann er United-leikari, er so ónossligur í atferð ella tí, at onglendingar ikki høvdu hoyrt "fuck" fyrr, sum væl ikki er nakað eksplisitt banniorð longur, men hann bleiv bannaður at spæla tveir dystir fyri at banna.

Nú, eg haldi ikki, tað er gott at banna. Ein ávís virðing eigur at kringa spælið, og ítrótt annars. Eg eri pápi at fýra, og royni sum best at koma mær undan illbønum. Ikki tí, eitt "helviti" her ella eitt "pínadoy" har fer treyðugt at forkoma teimum moralskt, men tí at onnur og minni ídnaðarslig orð eru til taks, taki eg oftast hesi framum. Tó, onkuntíð, eins og við sarkasmu og háðan, er lekkurt at banna so at fremja meiningina.

Men revsingin, Rooney fekk, hevur einki við virðing at gera. Nei, viðferðin hjá enska fótbóltssambandinum og littu pressuni, hvørs lynsjmentalitetur til eina lúsa illbøn er heilt óhoyrd, er enn eitt dømi um sosialstýring.

Um betrivitandi kontrollfrikar, ið halda seg hava ein óyvirlítandi moralskan myndugleika at gera av, hvat vit sleppa og ikki sleppa, sjálvt um tað, vit ikki longur sleppa, eitt nú at niðra islam og politiskt korrektar økofrikar, á als ongan hátt skaðar hesi, ið halda seg vera rakt.

Samanumtikið ein evropeisk stevna, har politikarir skíta á okkara rætt til privatlív, men ístaðin, og leiddir av "prógvum" frá sínum stovnum og stovum, halda seg hava rætt til at gera av, hvussu vit verða mest lukkulig.

Stavnurin, ið bannaði inn í filmstólið, tað er hann. Tað er, hvør hann er. Soleiðis sær hann út. Soleiðis ber hann seg at. Ókey, hann er ein seriuhjúnabandsbrótari, men ikki nakar Che Guevara, eitt seriumyrðandi uppreistrarikon. Tað er ósiðiligt at lata flengmoggandi Rooney fáa toyggið, bara tí hann ikki umboðar hatta nydeliga og eyðmjúka ungfólkið, vesturlendskir myndugleikar og tess mannahatandi ávaringarstovnar søkja.

Eg skilji væl hví fótbóltsheimurin stúrir fyri Rooney. Hansara hvessandi andlit og illsinnisgleps passar ikki inn í tí nýggju, reinu, sanitetseraðu útgávuna av einum spæli, fyri ikki at siga verð, frælsisstjalandi myndugleikar og partafelagsítrótturin ynskir at prosjektera.

Nei, vit vilja hava ein tankaleysan og træklemmandi ungdóm, ein smílandi og sælan ungdóm. Ein ókritiskan ungdóm; ein, ið heldur tað sama sum hini og substituerar fríggjadagsbomm við økologiskt brokkoli.

Ein lýdnan ungdóm, sum ikki tosar um prinsippir, um framsagnarfrælsi og nakað so rættvíst og íborið sum hevnd, men ger, sum hann fær fortalt. Harrin forbjóði, um Rooney og hansara ópenu og ókorrektu X-Box spælandi kollegair kanska hava følilsir eins og vitonnur, ið ikki enn eru vorðin formyndað íhel.

Tað tykist sum um, at tey, ið ýla mest um tolsemi, faktiskt hava minst tol, og er tað henda tagnaðartyranniska elita, ið krevur at umvæla Rooney og hasi friðarspillandi elementini, ið ikki vita, nær tey skulu halda hol. Sjálvrættvísa elitan ynskir at siga honum, hvussu hann skal uppføra seg. Hon ynskir at gera honum greitt, at ikki bara skal hann halda uppat við at banna, men at hann skal flenna upp um bæði oyru, tá ið hann skorar.

Tað er nú heldur ironiskt, tá tú hugsar um tað: handa sama stokkkonservativa javnaðarelitan, ið brúkar ósømiliga orku uppá at fortelja sínum nikkandi massa, hvussu ræðuligt tað er, at ungdómurin nú á døgum ikki er nóg glaður, eginliga er tann sum, ja, ikki er nóg glað.

Hasir ússaligu fanarnir sóu Wayne Rooney skora eitt brilliant hattrikk á Upton Park, men teir eru ikki glaðir. Ístaðin gera teir ikki annað enn at stuna og vena seg um eitt neyðars banniorð.

Opinberiliga eru vit ræðslusligin fyri spontaniteti. Helst er tað akkurát hesin, ið argar. Tað er jú í hesum, at landsapparatið risikerar gerningar, ið ikki frammanundan eru fyriskrivaðir. Gera vit nakað so spontant sum at opna ein kipsposa, til dømis, fáa vit at vita, at "tað er bara at blíva við, so oyðileggja tit planetina, tykkara hedonistisku umhvørvissvín."

Ikki bara er kips óforskammað dýrt, og er blivið tað í tráð við at vit renna meiri og meiri og meiri... og meiri, og at forbjóðandi Fólkaheilsuráðið heldur seg vera vigtigari enn tað í grundini burdi verið, men nú boðar reyðgrøna ørindablaðið hjá føroyska daddustatinum, Strok at navni, frá, at etur tú kips, gongur verðin undan.

Tey rationellu vita væl, at hetta er óblandað bullshit og vatmelóns-propaganda, men hey!, boðskapurin hevur longu fingið fastatøkur.

Eitt er ein kipsposi ella seks, sum vit vegna illavorðnum feittsýrum harumframt blíva so ónormalt feit av. Verri er, at vit nú eru so bebba-rædd fyri spontaniteti og samfelagsligum avvikum, at valdskipanin nú tráar eftir eini robottsligari einvending, og tá ið problembørn sum Rooney, sum forrestin elskar kips, ikki eru við uppá tað, verða tey revsað.

Forboðsfólkini øtast, tí Rooney er ein fyrimynd, siga tey, og tá ið hann bannar, fara børn at halda, at tað er í lagi at banna. Ja, sjálvandi, og tí er tað, at tá ið sonurin sær Tim Cahill boksa hornaflaggið, tá fer hann at gera tað sama við kettuna. Nei, soleiðis fungerar tað ikki rættiliga.

Eg veit ikki, hvussu tómur nýríki Rooney er, men hann er so ongantíð ein fyrimynd, bara ein framúr fótbóltsspælari. Vit, foreldur og onnur, eru fyrimyndirnar.

Í samband við vitjan av íslendska forsætismálaráðharranum og hennara betru helvt fingu vit so eitt meiri staðbundið dømi um hvussu tey órættvorðnu aldri fáa frið, tá ið tann altíð so konsensuskrevjandi Uni Arge, vikuskiftishøvundur hjá Sosialinum, skrivaði:

"Trongskygdir borgarar og politikarar fara altíð at siga sína hugsan, og fólk sum Jenis av Rana skulu eisini hava rætt at tala frítt. Men veruleikin er, at føroyingar í løtuni verða úthongdir í heimspressuni sum ógestablíðir homofobar og víðgongdir ørvitisknokkar. Vit eiga at staðfesta í okkara nýggju stjórnarskipan, at í Føroyum er rúm fyri øllum, og við lógini á lofti vísa umheiminum, hvat okkara veruliga virðisgrundarlag er."

Álvara, øllum? Eisini Jenis av Rana og "frelstum" ørvitisfiskum, ið á ongan hátt yvirhøvur skaða nakran? Teirra "brot" er at hava eina "órættvorðna" meining. Tað er tað. Eina meining, sum ikki so mikið sum leggur upp til eina óbeinleiðis hóttan.

Tað er nettupp poengið við einum fólkaveldi, einum liberalum fólkaræði, ið jú er treytað av eini áhaldandi ósemju, at tað skal rúma bæði Jenis av Rana og Wayne Rooney. Talufrælsi eigur ikki bert at vera fyri keðilig og borandi fitt fólk og moralskar relativistar, hvat enn Theodor E. D. Olsen—sjálvur ein teirra — roynir at billa tær inn. (Hetta er, hóast alt, sami klimaprestur, ið gav mannaættini, kapitalismuni og yvirforbrúki yvirhøvur, skyldina fyri at hvítabjørnin fór at doyggja út, tá ið faktum er, at í dag eru 25000 hvítabjarnir samanborið við 5000 í 1940.)

Tvey ting. Tað er sera ivasamt í hvønn mun føroyska umdømið verður svertað. Eg lesi dagliga útlensk dagbløð, skikkaðar heimasíður og, í ovurmát, útlendskt útvarp, serliga enskt, og higartil havi eg hoyrt... akkurát onki um Jenis av Rana ella homofobisku Føroyar.

Øll samfeløg rúma homofobar, rasistar, slagistar, eisini "fyrimyndarliga" Danmark, sum kortini er tað mest fremmandahatska og óliberala landið í Evropu, og tí er Jenis ikki ein søga.

Nummar tvey. Tað er væl betur at hava ódámligar meiningar undir ljósinum enn goymt undir teppinum, har tær fáa loyvi at liva seg feitar og púrasta óavbjóðaðar.

Harumframt er tað politisk analfabetisma at lokka fíntfølandi myndugleikar at klemma eina so grundliggjandi lóg, so ævig sum ein stjórnarskipan, bert tí at "veruleikin" hjá einum vikuskiftishøvundi fortelur honum, at vit føroyingar í løtuni verða úthongdir í heimspressuni sum homofobar.

Ein stjórnarskipan, ella grundlóg, skal væl grundast á nøkur djúptøkin, verldarvon og tíðarleys virði, hvørs innihald og prinsipp ikki lata seg lita av, hvat er "uppi í tíðini".

Tak John Stuart Mill! Hansara størsti ótti var ikki so nógv hetta, at avdúka maktina, tey ráðandi og statsmaktina, men — sum Flemming Rose kallar tað — "den offentliges menings tyranni." Og tað er júst hetta, ið hendir hjá okkum, serliga tá ið landsapparatið er so veikt og grunt og virðisfátækt, at tað ikki so nógv er statsmaktin, men heldur felagsskapsnormar, har tað er ein elita ella ein felagsskapur, sum ger av, hvat tú kanst loyva tær at siga.

Søguliga sært tú, at normarnir, hvat tú kanst siga, broytast støðugt, og at hesir ikki so nógv eru stýrdir av hvørt tú hevur nøkur universell virði ella eina avísa virðing fyri menniskjanum, men aleina stýrt og treytað av hvussu tað einstaka samfelagið, einstaki felagsskapurin, uppfatar, hvat tú kanst loyva tær at siga, og hvat tú ikki kanst loyva tær at siga.

Uni Arge og, tíverri, ein asins rúgva av "modernaðum" meiningsmyndarum tykjast at hava eina upppumpaða mynd av Jenisa yvirtalingarevni, og lítið álit á hansara egna førleika at sannføra.

Men gakk við politiskum dirvisloysi. Tað veruliga órógvandi er Unasa støða, ið jú er fornermandi sum ólukkan fyri tann meiniga mannin. Ætlandi eru vit so góðvarin og so pillbýtt, at bert við at lurta eftir Jenis ger, at vit formast til eitt bøssahatandi harkalið.

Hví ikki geva Jenis av Rana allar møguleikar frítt at siga sína hjartans meining, fyri síðani at lata hann standa til svars fyri einum skilagóðum almenningi? Tað má vera tað, tagnaðartyranniska elitan og tess paternalistisku fylgissveinar halda: at tú ikki sjálvur klárar at hugsa.

Problemið er, at vinstravongurin er blivin ótolerantur fyri eini opnari og gjøgnumskygdari atgongu til fría framsøgn. Uppruna-marxistar, ið endaðu sum vælbjargaðir sosialdemokratar, eru nú eins substansríkir og sukurvatt á síðsumri. Og tí er tað, at tá ið vitaðrir, liberalistarnir, taka undir við anti-sensuristiskum áskoðanum, og tí vilja strika 266b, verða vit ákærdir fyri at vera homofobar.

Noam Chomsky segði tað so væl:

"If you believe in freedom of speech, you believe in freedom of speech for views you don't like. Goebbels was in favour of freedom of speech for views he liked. So was Stalin. If you're in favour of freedom of speech, that means you're in favor of freedom of speech precisely for views you despise."

Men hetta sær ikki út til at rína við býttu elituna...

Ístaðin, tak væl ímóti eini verð, har tey, ið víkja frá normalinum, ið hætta sær at bróta slóð og siga tað óhugsandi, og tora at manifestera síni sjónarmið, enda sum útskot! Ein verð, har tey "klóku høvdini" forlanga, at tú lenar teg at teirra idéfátæku kanningum og terroriserandi tilmælum, heldur enn at lena teg at egnum morali—og gera nakað so kollveltandi sum at hugsa fyri teg sjálvan.

Ein dag, kanska, fara vit at síggja, at tað ikki er Wayne ella Jenis og teirra illavorðna kompaní, ið eru gleðisleysir, men hasir forbjóðandi vanlukku-profetarnir, sum upp í saman siga teimum, hvat er loyvt at siga, og hvat ikki er loyvt at siga.